# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Alvilda Heinesen, Hósvík**, andaðist leygarkvøldið á Korndalsbýlinum á Eiði 70 ára gomul. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00 úr kirkjuni í Hósvík. Tey, ið vilja minnast Alvildu, kunnu lata Korndalsbýlinum á Eiði eina peningagávu; konta í peningastovninum.

**95 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. oktober verður Andreas Hammer, bátasmiður, Runavík, 95 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sjócafeini leygardagin 7. oktober. Vælkomst verður frá kl. 19.00.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. oktober verður Annefía Hansen, Saksun, nú búsitandi á Ellisheiminum í Tórshavn, 90 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Annufíu, eru vælkomin á Ellisheimið millum kl. 16.00–19.00.

**80 ára føðingardagur**
Tórsdagin, 5. oktober, fyllir fyrrv. sýslumaður, Ejler Djurhuus, Trongisvágur, 80 ár.

**85 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. oktober fyllir Kristian Rasmussen, Skála, 85 ár. Opið hús verður í tilhaldinum á Eldrasambýlinum Vesturskin á Toftum frá kl. 16.00 til kl. 20.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. oktober fyllir Svend Olsen, Rosenhøj 44, 2650 Hvidovre, 70 ár.

**60 ára føðingardagar**
8. oktober fyllir Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn 60 ár. Dagurin verður hildin saman innbodnum tann 6. oktober í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A.

Fríggjadagin 20. okt. verður Torgerð Suðuroy 60 ár. Dagurin verður hildin í VB-húsinum, 20/10 kl. 19.00. Tey ið vilja gleða hana við at koma, verða biðin um, at siga frá áðrenn 12. okt. á tlf. 373169, 253177 ella 262633

**50 ára føðingardagur**
Sunnudagin tann 30. juli høvdu Kristin og Poul Juul Michelsen, Froðba 50 ára føðingardag. Føðingardagurin verður hildin í ítróttarhøllini í Trongisvági leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 371254 ella 372351 áðrenn 9. oktobur 2006.

**Krúndiamantbrúdleyp**
Mikudagin 4. oktober, kunnu hjúnini Astrid og Jógvan Gerðalíð halda teirra krúndiamantbrúdleyp. Vælkomin í Betesda kl. 18.00.

**Silvurbrúdleyp**
3. oktober hava Kirstin og Óli Jacobsen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Minningarorð um Rúna Fróða Heinesen

## 22/04-66 - 18/09-06

Nógv eru minnini, nú tað aftur er stilt. Tað er so óskiljandi, at tú ikki ert her. Tú komst inn á gólvið at spyrja, um eingin kaka var, ella ein drekkamunnur var gjørdur? Komst altíð glaður og við einum priki. - Hetta var Rúni.

Rúni og eg vuksu upp saman, kann eg siga. Anna, systi , hevur verið, sum ein mamma fyri meg. Rúni var eitt serstakt menniskja, var altíð klárur at hjálpa og gleða onnur, men vantaði einki sjálvur.

Tú vart bara 15 ára gamal, tá tú fórt at hjálpa abba tínum í fjósinum, og har vóru tit saman í 13 ár, tá fór abbi frá fyri aldur. Og tú fórt so í annað arbeiði, men tey seinastu árini høvdu tú og abbin seyð saman, og væl var passað.Síðsta heyst slapp eg at fletta veðrin hjá tykkum, sum vigaði 92 pund.

Tú vart so glaður, tá tú og pápi tín høvdu málað seyðahúsið. Nú var aftur klárt at koyra seyðin inn, tú hevði sligið gras og fingið ballað ballur og koyrt tær inn í seyðahúsið, - klárt til veturin. Tú spurdi meg, um vit ikki skuldu hava nøkur heystlomb saman, nú abbi ikki orkaði longur. Tú vildi ikki hava so nógv, sum nú, tí tú skuldi passað ærnar hjá abba. Hann var alt hjá tær, og tú vart alt hjá honum. Hann vildi eisini, at tú skuldi hava sethúsini, sum tú ikki náddi at flyta inn í, tí har uppi vart tú eisini føddur. Tú hevði keypt ein nýggjan bil, sum tú vart so øgiliga glaður fyri,og so hendi alt hetta. - Hetta syrgiliga.

Eg veit væl, at tað er ringt hjá tær pápi. Tú sigur, at tú ikki skilir tað. Tú segði við meg hatta kvøldið. “Hví taka Rúna, áðrenn meg?” Tað er so nógv, vit ikki skulu skilja. Eg haldi, at Rúni var ov góður at vera her á foldum og Harrin hevði brúk fyri einum so góðum menniskja, sum Rúna nú.

Hetta er so ófatiligt. Eg var suðuri



í Havn á sjúkrahúsinum hendan lagnumorgun. Gav mær so stundir at fara upp á deild 8 at vitja tveir arbeiðsfelagar, sum vóru innlagdir har. Tað var beinanvegin, at aðrir, sum eisini vóru har, spurdu eftir Rúna, sum sjálvur hevði verið innlagdur fyri 4 døgum síðani. Eg segði, hann hevði tað gott, tí tað var helst bara ein vøddi í bringuni, sum hevði strekt seg. Vit høvdu verið saman fríggjakvøldið á Giljagarði, tá pápi mín, abbi Rúna, hevði føðingardag. Seinnapartin leygardagin hevði hann verið vesturi í Vágunum við LÍF. Og sunnukvøldið hevði hann vitjað abba sín, so tað mundi vera í lagi.

Lítið veit man. Tá eg var komin norður aftur til Leirvíkar, hoyrdi eg, at Rúni var farin á sjúkrahúsið í Klaksvík, og tað sá ikki væl út. Beinanvegin ringdi eg so til Annu og spurdi, hvat var hent og hoyrdi á málinum, at okkurt álvarsligt var hent, so komu orðini, “Rúni er farin, hann er deyður.” Tað var, sum alt steðgaði upp. Tað er sum orðatakið sigur: ”Eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir”.

Rúni var trúfastur. LÍF var hansara hjartabarn. Hvønn dag setti hann tíð av til LÍF. Hjá teimum vaksnu var umráðandi at fáa teir at trívast so væl, sum til bar. Teir kendu Rúna upp á hvør sín serliga máta. Hann var altíð við tí góða og altíð klárur at hjálpa, hann snakkaði við spælarnar uppá ein máta, sum tað vóru hansara dreingir. Alt skuldi vera so gott, sum til bar. Væl dámdi honum eisini at koyra runt at hyggja eftir øðrum fótbóltdystum og ikki at gloyma Manchester United.

Summarið 2002 vart tú við okkum niðri í Danmark við dreingjunum á venjingarlegu. Sum altíð, var tú ein góður stuðul við hjálp tíni til øll tiltøkini at samla pening inn. M.a. skóru vit kjálkar og seldu tað í bygdini. Tað var Rúni, ið tók sær av at koyra runt at selja. Tað var so lætt hjá honum at snakka við fólk. Ja, vit kláraðu ikki at skera undan, so var hann longu aftur.

Genturnar 14-17 ár blivu føroyameistarar í ár. Hesum var hann stoltur av. Hann segði fleiri ferðir, at hann ætlaði at geva teimum rósur frá sær.

Rúni var familjukærur. Familjan var hansara eitt og alt. Vit gjørdu eisini nakrar túrar um summarið t.d. túrurin úti í Skúvoy var ein góður túrur. Tað var altíð tú, sum undirhelt, dugdi so illa at verða álvarsamur. Túrar í haganum vóru vit eisini javnan, og saman gingu vit eisini á fjall. Títt fasta pláss var at vera uppi í Mjávurók og taka ímóti seyðnum fyri at fáa hann niður. Har verður eingin Rúni hesuferð, og tað verður tómligt at koma á rætt, og tú ikki ert millum okkum har, nú heystfjøllini verða gingin.

Nú minnini verða goymd, men ikki gloymd. Saknurin og sorgin tung eru at bera hjá tykkum, góðu tit, Anna, Petur Jacob, Ovi, Torleif og Karin v/ fam. Má Harrin styrkja okkum øll.

**Tórolvur**

John Klein Olsen:

# 35 ár í sløkkiliðnum í Vestmanna

Um seks tíðina mikukvøldið 27. september 2006 handaði John Klein Olsen brandmeistaranum, Símuni Simonsen, lyklarnar til brandstøðina í Vestmanna.

John sigur, at hann var biðin av kommununi at verða brandmaður fyri 35 árum síðan. Síðani tá hava tríggir brandmeistarar sitið á trónuni. Í byrjanini var tað Smith Nicolaisen, sum var brandmeistari, síðani var tað Óla Hans Jacobsen og nú til seinast Símun Simonsen.

John er í dag 72 ára gamal. Hann hevur arbeitt sum maskinmaður alt sítt lív. Fór til skips sum 14 ára gamal og silgdi í nógv ár.

Hann sildi í fleiri ár um Vestmannasund, fyrst við Bragd og síðani við bilferjuni Sam. Tá rutan um Vestmannasund bleiv vvirtikin av Strand-



ferðsluni, fylgdi John við og øll kenna hann, sum hava ferðast um sundið.

Við sínum maskinroyndum fekk John litið upp í hendur at røkja tey strandferðsluskipini, ið vóru løgd og liggja í Vestmanna.

Brandmeistarin Símun segði á samkomuni, at John hevur sum eingin annar røkt sítt brandmansstarv til lítar.

John hevur víst hegni og ein sera stóran áhuga fyri starvinum. Nú brandstøðin hevur staðið í gerð, og støðin hevur fingið nógva nýggja útgerð, liggur arbeiði hjá John ikki eftur, jú hann hevur røkt starvið, sum brandmaður við lít.

John sigur, at honum hevur dámt arbeiðið væl. Arbeiðið sum brandmaður í Vestmanna, sum í so nógvum bygdum er ólønt, men John sigur, at tað er tankin um at hjálpa tá á stendur, sum telur hvørja ferð.